

# – Her er mítt heim

TAÐ VAR IKKI BER TILVILD, AT SALLYVER Í DAG ER KONA NIELS. - EG FEKK FAKTISK EINI PROFETISK ORÐ FRÁ PRESTINUM Í SAMKOMUNI, HAR HANN SEGÐI AT EG SKULDI GIFTAST VIÐ EINUM TÓNLEIKARA, GREIÐIR 26 ÁRA GAMLA SALLYVER FRÁ



er eitt sera væl umtókt og vakurt frítíðarstað hjá ferðafólki.

Eftir at hava verið borin á lógvum í tvær vikur, var tíðin komin at venda heim aftur til Føroyar. Hóast nógvir túsund kilometrar eru millum Vágoynna og Palawan, kundi henda fjarstøðan ikki forða kærleikanum at blóma millum tey bæði forelskaðu.

- Áðrenn eg fór avstað, avtalaðu vit at halda sambandið við líka, tí eg hevði góðan hug at bjóða henni til Føroyar at vísa henni okkara land.

Sum sagt, so gjørt, og í oktober mánaði fyrraárið var Sallyver á fyrsta sinni í Føroyum. Og hon steðgaði rættiliga leingi - í samfullar tríggjar mánaðir.

- Satt at siga, hevði eg einki ímóti at hon steðgaði væl longur, kemur tað stillisliga frá Nielsi.

## Svaraði ja

Nakað áðrenn hon fór heimaftur í januar mánaði í fjør, bar Niels upp bønarorð til Sallyver:

Hevði hon hug at koma aftur til Føroyar, var einki til hindurs fyri tí. Hevði hon hug at búgva í Miðvági, var einki til hindurs fyri tí. Hevði hon hug at gifta seg við honum, skuldi einki kunna forða hesum. Og hon svaraði ja beinanvegin.

So gekk tað skjótt. Niels fór aftur til Filipsoyggjarnar í mars mánaði; steðgaði har í fimm vikur, og 2. mai lendu tey aftur í Føroyum - tann komandi brúðgómurin, komandi brúðurin og mamma hennara, Salome.

- Tað vóru 14 rokmiklir dagar, tí brúdleypið skuldi standa 16. mai. Men tað gekk alt sum tað skuldi.

Fyri tveimum árum síðani var einki sum bendi á, at hon skuldi búseta seg í Føroyum.

Sallyver arbeiddi innan almennu umsitingina; og var fult upptikin við andaligum arbeiði sum lovsangsleiðari í kirkjuni, saman við vinkonum sínum.

Men ein dagin fekk lív hennara eina aðra vend. Presturin í kirkjuni segði, at hann hevði fingið ein boðskap frá Gudi og sum var beinleiðis ætlaður henni.

- So løgið tann enn kann ljóða, so segði hann, at eg í fyrsta lagi skuldi giftast við einum manni frá Gudi. Í øðrum lagi skuldu vit bæði arbeiða saman í Guds ríki. Og í triðja lagi segði hann, at komandi maður mín skuldi duga at spæla eitt ljóðføri.

- Skal eg vera heilt erlig, so trúði eg tí ikki rættiliga tá. Men hinvegin, so veit eg, at Gud er mentur til alt, eisini til at broyta umstøðurnar hjá okkum, greiðir Sallyver frá.

Og Gud broytti mangt í hennara lívi. Hon hevði aldrin droymt um, at flyta frá familju síni í Filipsoyggjunum, ella gifta seg við einum fremmandum manni. Men tá hon kom í samband við Niels, var tað bara at fylgja Guds vilja við henni.

- Hetta var kortini eingin løtt avgerð, tí eg hevði eitt gott arbeiði, og hevði enntá møguleika fyri at fáa fast arbeiði. Eg legði alt fram fyri Gud; eg hevði eisini álit á Nielsi, og væntaði tí, at alt fór at laga seg.

Saman við manninum býr Sallyver nú í einum deiligum húsum í Miðvági. Og um nakrar fáar vikur skulu tey verða foreldur á fyrsta sinni.

- Eg vil fegin búgva her restina av mínum lívi. Man venur seg so líðandi til tey føroysku viðurskiftini. Og í mínum hugaheimi er hetta mítt heim, slær Sallyver fast.

## Byrjaði við stormi

Hjá einum fremmandum er altíð spennandi at vitja í nýggjum landi. Og hjá Sallyver var ein av spurningunum, hvussu móttøkan mundu fara at verða.

Her varð hon av sonnum tikin á bóli. Øll í familjuni hjá Nielsi vóru sera blíð og fyrikomandi, og bjóðaðu henni heim til tey at vitja.

Tað vóru eisini onnur fólk, sum vildu vísa henni gestablídni - og fegnast um, at nú var líkt til at bilmekanikarin Niels hevði funnið sær konu.

- Eg minnist eina konu, sum eg als ikki kendi. Hon kom forbí her hjá okkum við einum vøkrum korti og eini vælkomstgávu. Tað var sera vakurt gjørt av henni.

- Í kirkjuni og missiónshúsinum her í Miðvági føldi eg meg eisini sera vælkomna. Øll vóru bara so fitt ímóti mær. Tað var gott, serliga tí at eg ikki skilti eitt petti av málinum ta fyrstu tíðina, greiðir hon frá.

Tað var kortini eitt sum undraði Sallyver almikið, og tað var skiftandi veðrið her á landi, og vindurin og avfallið um veturin.

- Eg minnist, at tey søgdu við meg, at tann dagin eg fyrstu ferð kom til Føroyar (altso í oktober 2008) byrjaði ódnarveðrið. Og tað vardi næstan til eg fór avstað aftur tríggjar mánaðir seinni, sigur hon brosandi.

Nú er hon so vorðin miðvingur og føroyingur, og arbeiddi á flakavirkinum í Vestmanna, inntil teir minkaðu um arbeiðsmegina fyrr í ár. Hon hevur somuleiðis luttikið á Sangskeiði og Kvinnutingi í leguhúsinum í Nesvík, og er haraftrat við einum lokalum bindiklubbi og bíbliubólki.

- Eg tosi hampiliga væl føroyskt, og eg læri nýggj orð hvønn einasta dag, sigur hon á góðum føroyskum máli.